Treysti spælir “at ringja 1-1-2”

Treysti er eitt sindur smæðin, tá ið hann kemur til Titu.

- Tú, Tita, sigur hann.
- Eg veit ikki, um eg hevði torað at ringt **1-1-2**.
- Jú, sigur Tita. – Sjálvandi hevði tú tað.

Vit kunnu altíð royna at spæla tað.

- Ehm... skulu vit kanska spæla, at tú ert svímað?

Og at eg so ringi **1-1-2**?

- Ja!, sigur Tita. -Tað spæla vit!

Treysti tekur eina spælitelefon.

- Rrring-rrring -nú ringir tað, sigur hann spentur.

Og nú kanst tú eisini spæla tað saman við einum vaksnum. Tann vaksni svarar, og tú finnur upp á, hvat er hent.

Ring rrring...

Alarmsentralurin, hvønn tosi eg við?

Hey (navn) Nær hevur tú føðingardag?

Kanst tú siga mær, hvat er hent?

Hvør er tað, sum hevur fingið skaða?

Hevur tú ella nakar annar fingið skaða?

Hvussu er støðan? Svarar hann/hon, tá ið tú tosar hann/hana?

Er nakar vaksin har, sum kann hjálpa tær?

Veitst tú, hvussu tann skaddi eitur?

Eg sendi ein sjúkrabil beinanvegin. Eg leggi á nú, og so gevi eg teimum í sjúkrabilinum títt telefonnummar, so ringja tey kanska til tín, um tey ikki finna. Hetta kláraði tú ordiliga væl. Ver bara har, inntil sjúkrabilurin kemur.

Til tey vaksnu:

Hetta spælið kann spælast aftur og aftur. Lat barnið “ringja”, og spyr inntil tú fært greiðu á, hvat er hent, hvør skaðin er og hvar barnið er statt.

Lær barnið at siga navn, adressu og føðingardag
Sig altíð “eitt-eitt-tvey” við barnið - ikki “hundrað og tólv” og vís barninum tølini á telefonini
Vís barninum neyðknappin á snildfonini, so at tað kann ringja 1-1-2, hóast telefonin er stongd.